# Fundarfrásøgn

**Á fundi:** Jórun Andreasen, Mildrid á Lógv, Lisbeth Næs, foreldraumboð, Sven Dahl og Markus í Norðnástovu, kommunuumboð, Eyðbjørn Jacobsen, starvsfólkaumboð og Vagn Foldbo, skrivari.

**Ikki á fundi:** Eingin

1. **Fundarfrásøgnin frá seinasta fundi**
   Fundarfrásøgnin frá seinasta fundi tann 5. mars varð lisin upp og góðkend.

2. **Kunning frá leiðsluni**
   - Frá mánadegnum 16. apríl er klárt at byrja matpakkaskipanina
   - Malan Hansen og Assa Færø fara í barsburðarfarloyvi ávikavíst í mai og oktober
   - 4. og 5. apríl hevði leiðslan tveir arbeiðsdagar í Vágunum. Tosað var um ymiskt til komandi skúlaár. M.a. vísir tað seg, at fleiri og fleiri ynskja sær flokslærarauppgávuna frá. Arbeitt verður víðari við hesum
   - Birgir og Vagn hava verið í DK og hugt at skúlainnbúgvi til nýggja skúlan
   - PISA-kanning hevur verið í dag. Tekniskt hevur royndin eydnast sera væl

3. **Setanarbólkur**
   Skúlastýrið valdi Jórun Andreasen, Eyðbjørn Jacobsen og Sven Dahl í bólkin.

4. **Økisfundur fyri skúlastýrini í norðoyggjum**
   Jórun tosar við Gunrið Kalsberg, forkvinnu í skúlastýrinum á Viðareiði, um at áseta komandi felags fund, sum skúlastýrini annars skiftast at skipa fyri.

5. **Ymiskt**
   Skúlastýrið gjørdi vart við, at tað ikki altíð er so greitt, hvat næmingarnir skulu gera í ítróttatímunum, t.v.s. om teir skulu hava ítróttaklæðir ella svimjiklæðir við. Skúlastjórin kunnar ítróttalærararnar um hetta.

*Fundur lokin kl. 18:15*

| | | |
|---|---|---|
| Jórun Andreasen, forkv. | Mildrid á Lógv, næstforkv. | Lisbeth Næs |
| Sven Dahl | Eyðbjørn Jacobsen | Vagn Foldbo, skr. |